# Fuglafjørður til reiðar at taka ímóti varmakeldugestum

**Varmakeldan í ár er nakað serligt, og munandi meira verður gjørt burtur úr á mentanarliga økinum enn vanligt. Orsøkin er, at í ár verða Fuglafjarðar Hornorkestur og málningaframsýningin á Varmakeldu 35 ár**

VARMAKELDA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir góðu dagarnir í summar hava higartil ikki verið so nógvir, hóast farið er um longsta dag. Tey gomlu plagdu at siga, at tá ið tað fór at myrkja aftur á náttini, kundi væntast, at veðrið eisini fór at broytast; tá fór summarið at halla. Men enn hava vit ikki havt nakað liggjandi summarveður at tosa um. Juli mánaði er júst byrjaður, og tí er enn ikki farið av allari tíð. Vit kunnu vera optimistisk og vóna, at vit enn eiga summarið til góðar. Okkurt árið fellir tað góða veðrið á tann seinna helmingin, og kanska verður tað eitt slíkt summar, vit fáa í ár. Vit kunnu bert vóna og biðja eftir, at veðurgudarnir fara at forbarma seg yvir okkum í juli og august. Fríggingarmyrkt verður ikki aftur fyrr enn á ólavsøku. So, myrkjandi náttin, tey gomlu tosaðu um, fer ikki at broyta veðurlagið soleiðis beinanvegin.

## Ein góður dagur

Mánadagurin í hesi vikuni var ein góður dagur við lýggju og nógvari sól allan seinnapartin. Hendan dagin vitjaði Sosialurin í Fuglafirði, har fyrireikingarnar til Varmakeldustevnuna, sum verður um vikuskiftið, vóru í hæddini.

Nógv stákan var í bygdini, og fólk vóru í góðum hýri.

Fyrst bar leiðin oman á sandin, har vit tóku mynd av Kyrjasteini, sum er tikin upp og ætlandi verður settur í stand. Onkur, vit tosaðu við úti við bátahylin, helt fyri, at skipið kanska er ov stórt og verður ov kostnaðarmikið at varðveita. Men er viljin til steðar, og peningur kann útvegast, er hetta kortini ikki ein ómøgulig uppgáva. Enn er tó langt á mál. Sum vit skiltu, er ymiskt tikið upp úr skipinum, men sjálv endurbyggingin er ikki byrjað. Tí kann væntast, at nøkur ár fara at ganga, áðrenn Kyrjasteinur aftur verður flotaður.

Leiðin bar nú út í bátahylin, har menn vóru í holt við at festa trappuna oman til stóru flótibrúnna av nýggjum. Niðri á brúnni gingu nakrir vælhýrdir smádreingir við tráðu. Onkur hevði posa við rækjum til agn, annar hevði makrel, og uppaftur ein triði hevði turkaði fiskapettir í sínum posa. Veiðan hevði neyvan verið tann stóra, tí eingin veiddur fiskur sást á flótibrúnni.

Og tó.

Hugdi tú betur niður í stilla sjógvin, fekst tú skjótt eyga á eini 2-3 stór alabogasíl, sum stillisliga fluttu seg aftur og fram niðri við botnin. Líkt var ikki til, at smádreingirnir í hesi løtu høvdu varnast sílini. Spurdi tí tann eina, um hann ikki vildi læna mær tráðuna eitt bil, so eg kundi fiska honum eitt stórt síl. Jú, tað var gamaní. Egndi eina rækju á stóra húkin og kastaði beint frammanfyri tað eina sílið. Í fyrstani lætst tað ikki um vón, men so byrjaði tað at fonglast við agnið - og skjótt hevði tað bæði húk og agn inni í kjaftinum. Eg rykti hart, men ólukkutíð brotnaði tráðan tvørtur av!

Menninir, sum stákaðust við bátahylin, vistu at siga, at bæði laksur og síl javnan vóru at síggja inni í bátahylinum. Teir hildu, at hetta er fiskur, sum er sloppin út úr aliringum á fjørðinum. Kanska finnur fiskurin ikki útaftur, helt ein av teimum fyri.



*Á veg til Fuglafjarðar at "snodda" til stemningin nú uppundir Varmakeldu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Standmyndirnar, sum ein listabólkur á Falster í Danmørk hevur gjørt. Tær eru hugtakandi og forvitnisligar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Standmyndirnar

Úti á grótgarðinum sóu vit nú tær fimm standmyndirnar, sum settar eru upp har úti. Myndirnar, sum ein listabólkur av Falster í Danmark hevur gjørt, eru hugtakandi á at líta. Tað eru listafólk í Fuglafirði, sum hava samband við henda bólkin. Undarligt skal tað vera, um hesar standmyndir í framtíðini ikki verða eitt ferðamál, bæði hjá føroyingum og útlendingum, sum vitja higar til lands. Í sjálvum sær eru hesar myndir eitt savn av stórslignari og sjáldsamari list. Kanska kundu fuglfirðingar, tá ið høvið býðst, sett upp eina talvu niðri við bátahylin, sum sigur ferðamanninum eitt hvørt um hesi stórbæru listaverk.


*Við endan av bygdini rennur Gjógvará so vøkur og hugtakandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Vit spákaðu okkum nú niðan til stoltleikan hjá fuglfirðingum - Mentanarhúsið, har menn vóru í holt við at laga eitt torg í góðveðrinum. Omanfyri húsið er økið vakurt og hugnaligt, og einki er at taka seg aftur í, at Fuglafjørður við hesum hevur fingið ein snotuligan miðbý. Umhvørvið við Mentanarhúsið er hugnaligt – við torginum sum fríøki, stóra matvøruhandlinum omanfyri, bókasavninum og kunningarstovuni uttanfyri, og úr hesum miðbýarumhvørvi sæst eisini oman í bátahylin og omaná standmyndirnar niðri á grótgarðinum.

Vakra landslagið við fjøllum og dølum, sum myndar Fuglafjørð, er ein frægd fyri eygað ein slíkan dag.

## Málar býráðsformenn

Úr túninum við Mentanarhúsið, bar leiðin yvir á bókasavnið og kunningarstovuna, sum er í hugnaliga gróthúsinum, ið stendur skamt haðani. Umhvørvið við inngongdina er ógvuliga vakurt við lágari grótlaging og vøkrum blómum.

Kunningarleiðarin, Petur Martin Petersen, var ikki at hitta, men ein ung og fryntlig genta kundi geva okkum eitt avrit av Varmakelduskránni og telefonnummarið hjá leiðaranum, sum hevur havt nógv um at vera nú uppundir stevnuna.

Uppi í býráðshúsunum í Fuglafirði gekst kortini betur; har funnu vit bæði býráðsformannin, Sigurd Simonsen og kunningarleiðaran, Petur Martin Petersen. Hóast teir báðir høvdu nógv um at vera, var tó einki til hindurs fyri at fáa teir út í túnið til myndatøku. Inni í býráðssalinum var danska listakvinnan, Vibeke Fonnesberg, sum hevur málað borgarstjórarnar, ið hava havt sæti í Fuglafjarðar kommunu síðan 1972. Har hittu vit eisini húsavørðin, sum fekst við at hanga málningarnar upp á veggin.


*Nú fær Fuglafjørður eisini torg, sum fer at seta sín dám á miðbýarumhvørvið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Hampa um

Á veg omanaftur gjøgnum bygdina í Fuglafirði sóust fólk, sum vóru í holt við at hampa um hús, tún og garðar, nú stevnan stundar til. Menn stóðu við pensli og málingablikki í hondini, og onnur stákaðust í aðrar mátar rundan um húsini.

Niðri í bygdini stóð plattur við málingablikkum uttan fyri handilin, og var tað onkur, sum ikki hevði hugsað um at snøgga um eitthvørt, sum lá á láni, var hetta ein góð áminning um, at nú var tíðin komin í hesum Harrans veðri hendan dagin.

Á veg niðanaftur úr Fuglafirði setti tú bilin enn einaferð og steig út úr honum. Tað var líkasum tvær myndir vantaðu – ein útyvir bygdina og ein av Gjógvará, sum so vøkur rennur omangjøgnum bygdina.

Varmakeldan í ár er nakað serligt, og munandi meira verður gjørt burtur úr á listarliga økinum enn vanligt. Orsøkin er, at í ár verða Fuglafjarðar Hornorkestur og málningaframsýningin á Varmakeldu 35 ár. Skipað verður fyri einum stórum tiltaki á norðurlendskum stigi. Hetta tiltak, sum meira er at lesa um í blaðnum í dag, fevnir eitt nú um ljóð, sang og tónleik – ella, sum fuglfirðingar sjálvir rópa tað: Menniskja í ævintýrum og søgnum – eitt norðurlendskt samtak.


*Hesir smádreingirnir hugnaðu sær við tráðu í bátahylinum í Fuglafirði í góðveðrinum mánadagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*


*Ætlanin er at seta Kyrjastein í stand aftur. Ymiskt er tikið upp úr skipinum, men sjálv endurbyggingin er ikki byrjað*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*